LM-052/2025

Fylgiskjal 1.

Gunnvá Ellendersen

Fra: Tóri Højgaard
Sendt: 1. oktober 2025 21:18
Til: Gunnvá Ellendersen
Cc: Brian Sjúrðarson; Løgmálaráðið
Emne: RE: Til ummælis - Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkayvirlit (Atgongd hjá ríkismyndugleikum til upplýsingar í Landsfólkayvirlitinum)
Vedhæftede filer: 25_23566-2 Hoyringssvar 2982247_1_0.pdf

Góðan dagin

Sí viðfesta hoyringssvar frá Dátueftiritinum

Vinarliga

Tóri Højgaard
Stjóri

Dátueftirlitið

Heiðavegur 25
FO-600 Saltangará

Telefon: +298 30 91 00
Beinleiðis: +298 29 91 00
Teldupostur: dat@dat.fo
Heimasíða: www.dat.fo

Øll málsviðgerð á Dátueftirlitinum er fevnd av dátuverndarlógini. Meira kunning um hetta er at finna her.

From: Gunnvá Ellendersen <Gunnvae@lmr.fo>
Sent: 03 September 2025 13:15
To: Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; Barna- og útbúgvingarmálaráðið <bumr@bumr.fo>; Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>; 'politi@politi.fo' <politi@politi.fo>; 'mbo001@politi.fo' <mbo001@politi.fo>; ro@fo.stm.dk; post@sorinskrivarin.fo; kif.faeroerne@krfo.dk; foe@stps.dk; FKO-KTP-AKO@mil.dk; sfs@dma.dk; Talgildu Føroyar <talgildu@talgildu.fo>; Dátueftirlitið <dat@dat.fo>; us <us@us.fo>
Cc: Elsa Magnussen <Elsam@lmr.fo>; Nella Festirstein <nellaf@lmr.fo>
Subject: Til ummælis - Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkayvirlit (Atgongd hjá ríkismyndugleikum til upplýsingar í Landsfólkayvirlitinum)

LM-052/2025

Góðu tit

Við hesum verður uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkayvirlit (Atgongd hjá ríkismyndugleikum til upplýsingar í Landsfólkayvirlitinum) sent tykkum til ummælis.

Endamálið við uppskotinum er at fáa greiða heimild til, at ríkismyndugleikar í Føroyum fáa atgongd til neyðugar upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum.

Uppskotið tryggjar, at ríkismyndugleikar í Føroyum kunnu brúka loysnirnar hjá Talgildu Føroyum til at veita føroyingum sínar tænastur talgilt.

Møguligar viðmerkingar kunnu sendast Løgmálaráðnum á teldupost lmr@lmr.fo í seinasta lagi **mikudagin 1. oktober 2025.**

Vinarliga / Kind regards

Gunnvá Ellendersen
Leiðsluskrivari / Executive Secretary

Mobile: +298 558097
gunnvae@lmr.fo

LØGMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Justice

Løgmálaráðið
Gongin 7
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn

+298 35 80 80
www.lmr.fo

LM-052/2025

Dátueftirlitið

Løgmálaráðið

Saltangará, tann 1. oktober 2025
J.nr: 25/23566-2
Tykkara skriv:
Málsviðgeri: BS/TH

Viðvíkjandi: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkayvirlit (Atgongd hjá ríkismyndugleikum til upplýsingar í Landsfólkayvirlitinum)

Dátueftirlitið hevur hesar viðmerkingar til lógaruppskotið og tekur støði í dátuverndarlógini[1]. Lógaruppskotið hevur til endamáls at geva ríkismyndugleikunum í Føroyum møguleika at fáa atgongd til upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum.

Dátueftirlitið tekur undir við, at ríkismyndugleikar í Føroyum kunnu veita føroyskum borgarum sínar tænastur talgilt, men vil vísa á, at skal endamálið røkkast, skulu tvær grundleggjandi løgfrøðiligar fortreytir vera til staðar.

Tann fyrra fortreytin snýr seg um *heimild ella viðgerðargrundarlag*. Skal fyrisitingin av Landsfólkayvirlitinum kunna lata øðrum upplýsingar úr Fólkayvirlitinum, skal ein heimild finnast sbrt. dátuverndarlógini.

Seinna fortreytin er at tryggja *fullgóða trygd*. Um persónupplýsingar skulu flytast út um økið, ið dátuverndarlógin fevnir um, skal fullgóð trygd veitast sbrt. dátuverndarlógini.
Í hoyringsskrivinum umrøður Dátueftirlitið hesar báðar løgfrøðiligu fortreytir. Tann seinna fortreytin nemur við heldur fløkt løgfrøðilig viðurskifti og fær tí mestu umrøðuna í hoyringsskrivinum.

Heimildin í lógaruppskotinum
Í lógaruppskotinum er ásett í § 31 a, at *"Ríkismyndugleikar í Føroyum eru í hesum kapitli javnsettir við aðrar almennar myndugleikar."*

Dátueftirlitið metir, at við hesum lógaruppskoti verða ríkismyndugleikarnir í Føroyum javnsettir við aðrar myndugleikar í Føroyum viðvíkjandi heimildini, sum hervið fæst sbrt. § 8, stk. 1, nr. 5 í dátuverndarlógini.

Sostatt verður greið heimild givin fyrisitingini av Landsfólkayvirlitinum at lata upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum til ríkismyndugleikar í Føroyum. Við hesum er fyrra fortreyt uppfylt til at røkka endamálinum í lógaruppskotinum.

Føroyar hevur støðu sum *trygt triðjaland*
Dátuverndarlógin hevur sína fyrimynd í ES-fyriskipan, nevnd GDPR[2], og í viðmerkingunum til dátuverndarlógina er ásett, at rættarstøðan í Føroyum í mest møguligan mun skal vera í samsvari við rættarstøðuna í ES[3].

[1] Løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum.

Í dátuverndarlógini er hugtakið *triðjaland*[4] brúkt, og tað fevnir um lond, sum eru uttanfyri ES. Eitt triðjaland kann eisini fáa støðu sum *trygt triðjaland*, og tá kunnu persónupplýsingar flytast frítt millum trygga triðjalandi og ES. Føroyar hava støðu sum trygt triðjaland.

Sambært § 59 í dátuverndarlógini krevur flutningur av persónupplýsingum til útlond (ES og EBS) ikki serliga góðkenning ella loyvi. Orsøkin er, at verndarstøðið í hesum londum verður mett at vera nóg høgt at veita skrásettum í Føroyum eina nøktandi trygd.[5]

Góðkenningar av tryggum triðjalondum skulu endurskoðast minst fjórða hvørt ár. Føroyar vóru seinast mettar av ES-nevndini tann 15. jan. 2024 og varðveittu tá sína støðu sum trygt triðjaland, tí fatanin hjá nevndini var, at Føroyar hava nøktandi verndarstøði og trygd í hesum høpi[6].

Í viðmerkingunum til dátuverndarlógina stendur, at "Tað er umráðandi fyri Føroyar – bæði fyri privata og almenna geiran – at Føroyar framhaldandi verða góðkendar av ES-nevndini sum eitt trygt triðjaland, so at upplýsingar millum Føroyar og ES-lond frítt kunnu verða fluttar. [7]"
Á sama hátt sum ES-nevndin kann Føroyar góðkenna onnur lond sum trygg triðjalond. Henda góðkenning verður gjørd við kunngerð, sum hevur heimild sbrt. § 60 í dátuverndarlógini, og tað er gjørt fyri eina rað av londum, eitt nú Stóra Bretland.[8]

Løgfrøðiliga støðan hjá ríkismyndugleikunum í Føroyum
Týðandi spurningur er, hvørja støðu ríkismyndugleikarnir í Føroyum hava í hesum høpi.

Dátuverndarlógin fevnir ikki um ríkismyndugleikarnar í Føroyum. Hetta sæst greitt í viðmerkingunum til dátuverndarlógina. Tað er danska Datatilsynet, ið hevur eftirlit við, at ríkismyndugleikarnir í Føroyum halda ta aktuellu lógina um viðgerð av persónupplýsingum, sum er galdandi fyri teir[9].

Ríkismyndugleikarnir í Føroyum eru ikki "staðsettir" í ES, og eru tí ikki fevndir av GDPR. Teir eru hinvegin fevndir av persondataloven[10] frá 1. juli 2017, sum er sett í gildi við anordning nr. 754 frá19. juli 2017[11].

Danska Datatilsynet vísir á, at Evropa Kommissiónin hevur góðkent Føroyar sum *trygt triðjaland,* men leggur afturat, at ríkismyndugleikarnir í Føroyum "ikke er omfattet". Eisini vísir Datatilsynet á, at um persónupplýsingar skulu flytast til hesar myndugleikar, skal tað gerast sbrt. art. 46 í GDPR[12] ella skal vísast til eitt undantak sbrt. art. 49 í GDPR.[13] Datatilsynet staðfestir soleiðis, at

---

[2] General Data Protection Regulation
[3] Viðmerkingarnar til dátuverndarlógina á síðu 35
[4] Sbrt. dátuverndarlógini § 6, nr. 16
[5] Viðmerkingarnar til dátuverndarlógina síða 122
[6] Føroyar framvegis trygt triðjaland í dátuverndarhøpi - Dátueftirlitið
[7] Viðmerkingar til dátuverndarlógina á síðu 22
[8] https://logir.fo/Kunngerd/175-fra-16-12-2020-um-tridjalond-sum-hava-noktandi-verndarstodi-vidvikjandi-flutningi-av-personupplysingum
[9] Viðmerkingar til dátuverndarlógina á síðu 38
[10] https://www.datatilsynet.dk/media/7841/anordning_om_pdl_for_faeroeerne.pdf
[11] https://www.datatilsynet.dk/media/7841/anordning_om_pdl_for_faeroeerne.pdf
[12] Samsvarandi greinin í dátuverndalógin er § 61
[13] Samsvarandi greinin í dátuverndalógin er § 62

ríkismyndugleikarnir í Føroyum ikki hava støðu sum "trygt triðjaland", tá talan er um flutning *úr* ES.

Ríkismyndugleikarnir í Føroyum eru sostatt hvørki fevndir av dátuverndarlógini ella GDPR og verða tískil bæði av Dátueftirlitinum og Datatilsynet roknaðir sum triðjaland.

Hvussu upplýsingar kunnu flytast frá Fólkayvirlitinum til ríkismyndugleikar í Føroyum
Sum nevnt ger danska Datatilsynet greitt, at fyri at kunna flyta persónupplýsingar til ríkismyndugleikarnar í Føroyum, er neyðugt at hava eitt "overførselsgrundlag" í art. 46 ella í art. 49 í GDPR.

Sama støðan er galdandi í Føroyum mótvegis ríkismyndugleikunum.
Flutningur av persónupplýsingum kann uttan víðari fara fram um so er, at 1) móttakarin er fevndur av dátuverndarlógini 2) móttakarin er fevndur av GDPR ella 3) um landsstýrismaðurin hevur tikið avgerð sbrt § 60 í dátuverndarlógini um, at móttakarin hevur eitt nøktandi trygdarstøði.

Onki av hesum trimum ger seg galdandi fyri ríkismyndugleikarnar í Føroyum.
Um ríkismyndugleikarnir í Føroyum vóru fevndir av dátuververndarlógini, fevndir av GDPR ella høvdu ella um landsstýrismaðurin sbrt. § 60 í dátuverndarlógini hevði tikið avgerð um, at ríkismyndugleikarnir í Føroyum hava nøktandi trygdarstøði, so var rímiliga lætt at flyta upplýsingar frá Landsfólkayvirlitinum og til ríkismyndugleikarnar í Føroyum, men sum nevnt omanfyri, so er hetta ikki støðan.

Henda staðfesting hevur við sær, at skulu upplýsingar sendast frá Fólkayvirlitinum til ríkismyndugleikarnar í Føroyum, skal hetta gerast sbrt. reglunum í dátuverndarlógini um *flutning til triðjalond o.a., sum er grundaður á fullgóða trygd.* Viðkomandi reglur til hendan flutning eru tá §§ 61 og 62 í dátuverndarlógini.

Dømi í lógaruppskotinum
Í lógaruppskotinum er ein samanbering gjørd og víst verður til, at føroyskir myndugleikar sambært donsku cpr-lógini hava heimild til at heinta upplýsingar beinleiðis úr CPR.[14] Út frá hesum dømi verður niðurstøðan gjørd, at so kunnu ríkismyndugleikarnir í Føroyum á líknandi hátt heinta upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum.

Her vil Dátueftirlitið viðmerkja, at danska fyrisitingin, ið umsitur CPR í Danmark, fekk heimild í cpr-lógini, sbrt. art. 6, stk.1 litra e í GDPR[15] at geva føroyskum myndugleikum upplýsingar. Her er sostatt fyrra fortreyt viðvíkjandi heimild uppfylt, og so langt heldur samanberingin.

Tá upplýsingarnir síðani skulu flytast frá CPR og til Føroya, so kann hetta gerast sbrt. art. 45, stk. 1 í GDPR, tí Føroyar hava støðu sum trygt triðjaland, og harvið er seinna fortreytin eisini uppfylt. Øðrvísi er flutningurin av upplýsingum, sum lógaruppskotið leggur upp til. Ríkismyndugleikarnir í Føroyum hava, sum víst á omanfyri, ikki støðu sum trygt triðjaland, og tí ber ikki til at flyta hesar upplýsingar á líknandi hátt, sum í dæminum í lógaruppskotinum.

[14] Á síðu 2 í lógaruppskotinum.
[15] Hendan áseting í GDPR svarar til § 8, stk. 1, nr. 5 í dátuverndarlógini.

Dátueftirlitið

Samanumtøka

Lógaruppskotið um Fólkayvirlit gevur fyrisitingini av Landsfólkayvirlitinum heimild at geva ríkismyndugleikunum í Føroyum atgongd til persónupplýsingar í Fólkayvirlitinum. Hendan heimild at viðgera persónupplýsingar er kravd sbrt. § 8 í dátuverndarlógini, og lógarheimild er greið í hesum lógaruppskoti. Hervið er fyrra forteytin uppfylt at røkka endamálinum í lógaruppskotinum.

Harafturímóti tekur lógaruppskotið ikki støðu til spurningin um flutning til ótrygg triðjalond. Um uppskotið verður samtykt í verandi líki, verður avleiðingin, at Landsfólkayvirlitið fær heimild at lata ríkismyndugleikunum upplýsingar, men at flutningurin til ríkismyndugleikarnar skal lúka krøvini í dátuverndarlógini um flutning til ótrygg triðjalond.

Dátueftirlitið fer tí at mæla til, at Løgmálaráðið fer undir eina tilgongd at meta um verndarstøðið hjá ríkismyndugleikunum í Føroyum. Um tað verður mett at verða nøktandi, so verður mælt til, at landsstýrismaðurin broytir unngerð nr. 175 frá 16. desember 2020 um triðjalond, sum hava nøktandi verndarstøði viðvíkjandi flutningi av persónupplýsingum, sum broytt við kunngerð nr. 62 frá 4. mai 2022 og leggur Danmark, hvat ríkismyndugleikunum í Føryum viðvíkur, afturat londunum ið verða mett at hava eitt nøktandi verndarstøði.

Vegna Dátueftirlitið

Tóri Højgaard
Stjóri